## Varðhald staðfest

Teir fimm menninir, sum vórðu tiknir í Íslandi í sambandi við tað stóra rúsevnamálið, skulu verða verandi í varðhaldinum. Teir fimm vórðu dømdir í varðhald, men skutu avgerðina inn fyri íslendska hægstarætt. Men tað hjálpti ikki. Í gjár staðfesti hægstirættur avgerðina hjá undirrættinum, og sostatt skulu teir fimm fyribils sita í varðhaldi til tann 18. oktober. Ein sætti maður situr í varðhaldi í Føroyum og tveir í Danmark.



## Motzfeldt leyp framav

Grønlendski landstingformaðurin, Jonathan Motzfeldt, noyddist í gjár at biðja tingmannin Jens B. Frederiksen um umbering fyri nøkur orð, sum fullu á einari samkomu í Nuuk seinasta fríggjadag. Á samkomuni fór Motzfeldt yvir til tingmannin hjá Demokratunum og segði sína hjartans hugsan um Demokratarnar og teirra politikk. Jens B. Frederiksen sendi formansskapinum eitt mótmæli, men sigur, at hann góðtekur umberingina.

# Sloyfur fyri 180.000




*Lena Lindenskov Mohr, blaðstjóri á Kvinnu, handaði Heidi Hvidbro, forkvinnuni í Bót til Bata, kekkin*

*Mynd: Eydna Skaale*

**Á tíðindafundi í morgun kundi Lena Lindenskov Mohr, blaðstjóri á Kvinnu, handa forkvinnuni í Bót til Bata, Heidi Hvidbro, ein kekk áljóðandi 182.242,30 krónur, sum eru komnar inn við sølu av serligu sloyfunum, ið felagið hevur tikið stig til at gera**

BRÓSTKRABBI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit skilja ikki bróstkrabba og hvat ið orsakar sjúkuna.

Tað er ein av niðurstøðunum frá tíðindafundi, sum Føroya Felag móti Krabbameini helt í Miðlahúsinum í morgun.

Formaðurin, Jákup N. Olsen, Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari, Margreth Mortensen, ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur og Heidi Hvidbro, forkvinna í Bót til Bata, greiddu frá um bróstkrabba á fundinum. 24 kvinnur fáa staðfest henda serliga formin fyri krabba um árið í Føroyum, og í meðal fær tíggjunda hvør kvinna einaferð í lívinum staðfest herviligu sjúkuna.

Tó at kvinnur verða munandi oftari raktar av bróstkrabba, so er ikki talan um kvinnusjúku burturav. Ein út av hvørjum eitthundrað monnum fáa eisini staðfest sjúkuna.

Eisini varð staðfest, at tilburðirnir eru tvífaldaðir seinastu tjúgu árini. Enn rakar sjúkan mest tilkomnar kvinnur, og tveir triðingar av tilburðunum raka kvinnur yvir 50 ár, men gongdin tykist kortini vera hon, at kvinnurnar gerast altsamt yngri, tá sjúkan rakar.

Hinvegin gerast eisini fleiri og fleiri kvinnur frískar eftir at hava fingið staðfest bróstkrabba, og tað skyldast betri og skjótari viðgerð.

### Pengar til gransking

Jansy Gaardlykke greiddi víðari frá, at tá kvinnur finna knútar í bróstunum, er tað tíbetur í flestu forum ikki óndartað, men tá tað hendir, verða kvinnurnar sendar á sjúkrahúsið til mammografi-screeningar. Og millum annað hetta hevur ført til, at deyðstíttleikin er minkaður.

Hon vísti annars á, at Hans Pauli Strøm, heilsumálaráðharri hevur lovað at seta mammografikanningar í verk fyri allar kvinnur í 2008, nakað, sum Føroya Felag móti Krabbameini fegnast almikið um.

Margreth Mortensen greiddi síðani eitt sindur frá mannagongdini, tá kvinnur hava fingið staðfest krabbamein. Fyrsta viðgerðin er tá vanliga kirurgisk, og síðani verður viðgjørt við kemoterapi ella strálum.

Viðgerðin verður altíð gjørd eftir bestu meting læknans og í samráð við ynski kvinnunnar. Ikki fyrr enn í 1992 var gjørligt við kemoviðgerð í Føroyum, undan tí mátti øll viðgerð fara fram í Danmark.

Aftur varð undirstrikað, at bæði kanningar og viðgerðir eru munandi betraðar seinastu árini. Men kvinnur, ið eru viðgjørdar fyri bróstkrabba, ganga til kanningar í tíggju ár.

Men hjálp og stuðul finst. Felagið Bót til Bata, sum varð stovnað í 1988, er ætlað kvinnum sum hava ella hava havt bróstkrabba.

Og í fjør tók felagið stig til, saman við blaðnum Kvinna, at gera og selja hesar serligu ljósareyðu sloyfurnar, og á tíðindafundinum kundi blaðstjórin á Kvinnu handa forkvinnuni í Bót til Bata heilar 182.242,30 krónur, sum inn vóru komnar við sølu av sloyfuni. Hon fór fram við at ein sloyfa fylgdi við blaðnum, sum í hesum sambandi var 30 krónur dýrari, umframt vanligari sølu.

Ein stórur partur av pengunum, 130.000 krónur, eru markaðar til gransking. Men tað ganga helst eini fýra til fimm ár, áðrenn ein slík gransking kann setast í verk reint fíggjarliga.



*Sigrid Rasmussen undirhelt við sangi á tíðnadafundinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*